# Starvsfólk til Starvsmannafelagið

**Starvsmannafelagið søkir eftir starvsfólki til umsiting felagsins at byrja eftir avtalu.**

**Uppgávur:**
Starvsmannafelagið er í holtur við at menna felagið og sóknast tí eftir fólki, ið við ágrýtni og fakfelagsanda skal røkja áhugamál felagsins og verða viðspælari hjá nevnd og tæna limum felagsins. Tú kemur at starvast í umsiting felagsins og eisini taka lut í dagliga umsitingarliga arbeiði felagsins. Høvuðsdentur verður lagdur á uppsøkjandi arbeiði, tiltøk í húsum okkara og vera við til at stinga út í kortið framtíðarhugsjónir felagsskapi okkara at gagni.

**Førleikar:**
Vit leita eftir einum starvsfólki við kunnleika til og áhuga fyri fakfelagsarbeiði, ið eisini hevur góð samstarvsevnir og hevur lætt at samskifta.

Kravt verður, at tú megnar at arbeiða sjálvstøðugt og undir trýsti.

Fyrimunur er at hava umsitingarligar royndir, góðan telduførleika, umframt góðan kunnleika til enskt.

**Setanartreytir:**
Starvið er fulltíðarstarv, við møguleika fyri niðursettari arbeiðstíð.

Vit bjóða eitt livandi og avbjóðandi starv við menningarmøguleikum, har tænasta og limarøkt er í hásæti.

Starvið verður sett og lønt eftir sáttmálanum millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknin skal vera Starvsmannafelagnum í hendi 31. mai 2007. Merkið brævbjálvan: Umsókn.

Meira fast at vita um starvið við at venda sær til Gunnleiv Dalsgarð, formann felagsins á tlf. 314868.

**Starvsmannafelagið**
**J.H. Schrøtersgøta 9**
**Postboks 165**
**110 Tórshavn.**
**Starvsmannafelagið**

Starvsmannafelagið er stórsta fakfelag á almenna arbeiðsmarknaðinum við uml. 1900 limum, sum starvast í teimum 4 sáttmálaøkjum felagsins, Fíggjarmálaráðnum, Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya, S.E.V og Føroya Tele (Føroya Arbeiðsgevarafelag), felagið hevur í dag tilsamans 116 álitisfólk á arbeiðsplássunum innan sáttmálaøkini. Starvsmannafelagið gevur út Starvsblaðið og hevur umframt kunning á heimasíðu felagsins www.starvsmf.fo. Í umsiting felagsins starvast formaður og skrivari felagsins.

# Klaksvíkar Sjúkrahús
700 Klaksvík

## Ortopædkirurgiskur skómakari & bandagistur frá SAHVA

Ortopædkirurgiskur skómakari & bandagistur frá SAHVA, verða á Klaksvíkar Sjúkrahúsi 19. og 20. juni 2007 og á Landssjúkrahúsinum 21. juni 2007.

Tíð fæst við at ringja á tlf. 45 45 45, mánadag og týsdag kl. 10-12, í seinasta lagi týsdagin 12. juni 2007.

# Bygdarstevnan 2007

**Fríggjadag 18. mei:**

**Fótbóltur** (heiðursmerkir til øll)
kl. 16.00 Skála – GÍ pinkur
16.45 Skála a – EB/St a ge. 10-12
Skála a – ÍF a piltar
17.20 Skála b – EB/St b ge. 10-12
Skála b – ÍF b piltar
18.15 Brotssparkskapping børn fødd 1997 og seinni gentur og dreingir
18.45 Brotssparkskapping børn fødd 1993 - 96
20.00 Brotssparkskapping vaksin

**Kiosk – pylsuvognur – tombola – skjótibani:**
Opið meðan tiltøkini eru.

**Leygardagur 19. mei:**

**Fótbóltur** (heiðursmerkir til øll)
kl. 08.30 Smápilta-kapping
Skála a–LÍF a og b–B36 b
10.00 Smápilta-kapping
Skála b–NSÍ c–B68 b–EB/S b
11.30 Smápilta-kapping
Skála c – NSÍ d og e – KÍ e
13.00 Smágentu-kapping
Skála – NSÍ – B68 – EB/St
15.00 Skála – TB
3. deild (steypadystur)
kl. 18.00 Eydnuhjól í høllini
kl. 09.30 – 22.00 Stórur plantimarknaður í høllini.

**Kiosk – pylsuvognur – tombola – skjótibani:**
Opið meðan tiltøkini eru.

**Sunnudagur 20. mei;**

**Fótbóltur**
kl. 15.00 Skála – NSÍ
Formula (steypadystur)
17.30 Skála – MB
2. d. menn (steypadystur)
18.00 Vørutombola í høllini
kl. 14.00 – 20.00 Stórur plantimarknaður í høllini.

**Kiosk – pylsuvognur – tombola – skjótibani:**
Opið meðan tiltøkini eru.

SKÁLA 1965

KRINGVARP FØROYA

# Ítróttarvaktir til Útvarpið

Vit søkja eftir fólki at arbeiða við ítróttartíðindum í vikuskiftum.

Meira fæst at vita um arbeiðið hjá tíðindaleiðaranum á telefon 347602 ella 214607.

***Kringvarp Føroya***
*Tíðindadeildin í Útvarpinum*

# KUNNGERÐ

## Broytingar av almennu byggisamtyktini fyri sóknina

Sambært løgtingslóg nr. 13. frá 21 mai 1954, um býarskipanir og byggisamtyktir við seinni broytingum, verður við hesum gjørt kunnugt, at broytingar í byggisamtykt/býarskipan, og kortum, fyri kommununa, verða lagdar fram til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni, frá 16. mai 2007 til 17. august 2007.

**BROYTINGAR:**

**Skælingur**
B-øki, bústaðaøki - Nýtt norðan fyri matr.nr. 8, uml. 2900 m²
B-øki, bústaðaøki - Nýtt sunnan fyri matr.nr. 8, uml. 1200 m²
F-øki, Almentænasta - lagt av til vatnreisniverk

**Leynar og Stykkið**
F-øki lagt av til vatnreisniverk matr.nr. 81b.
B-øki lagt av á matr.nr. 49a
Matr.nr. 20b er broytt frá F-øki til B-øki
Matr.nr. 20a er strikað sum B-øki vestan fyri vegin
Matr.nr. 1a er lagt av til B-øki (fjós)
Matr.nr. 23 eystan fyri vegin er strikað sum B-øki
Matr.nr. 11b er broytt frá F-øki til B-øki
Matr.nr. 45 er lagt til B-øki
Partur av matr.nr. 21a er lagt til B-øki
Matr.nr. 5a er lagt til B-øki
Matr.nr. 1a Frammi í Gerði; B-økið víðkað
Matr.nr. 6 Frammi í Andrasargerði; B-økið víðkað
Leynahagi Framman fyri Húsini er lagt av til B-øki
Stykkið, norðan fyri matr.nr. 67c er lagt til B-øki
Stykkið, matr.nr. 355, og partur av matr.nr. 73 er strikað sum G-øki
Stykkið, matr.nr. 67a, 73 og 355 er lagt sum F-øki
Stykkið, F-øki lagt av til vatnreinsiverk

**Kvívík**
Matr.nr. 82 er lagt sum B-øki
Matr.nr. 306 er lagt sum B-øki
Matr.nr. 102 er lagt sum B-øki
Matr.nr. 64 er lagt sum F-øki.
B-øki á matr.nr. 150 er víðkað
B-øki er lagt av Frammi í Dalinum (Gamlatrøð, Reyðbersheyggjur, Rossatrøðin)
F-øki er lagt av Frammi í Forna (á Hellu)
B-øki er lagt av við Grásteinsstykki og Úti á Mørkini
Atkomuvegur lagdur av til matr.nr. 284
B-øki lagt av í Ognarhaganum millum Breiðá og Forná (Nielsargerði)
F-øki lagt av til vatnreinsiverk
C-øki lagt av norðan fyri smáttirnar

**Válur**
B-øki er strikað norðan fyri vegin
D-øki lagt av til bátahyl
B-øki er víðkað á matr.nr. 385
B-øki er víðkað á matr.nr. 393a
F-øki lagt av á matr.nr. 383 og matr.nr. 398

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot verða at lata kommununi skrivliga í seinasta lagi 17. august 2007.

*Kvívík tann 15. mai 2007*

## Kvívíkar kommuna
Víkarvegur 4 · 340 Kvívík · Tlf. 42 12 94 · Fax 42 14 98

# Klaksvíkar Sjónleikarafelag

Aðalfundurin verður í hølum felagsins á Gomlu Brandstøðini hóskvøldið 31. mai kl. 20.00.

Skrá sambært løgum felagsins.

**Klaksvíkar Sjónleikarafelag**